Kommunufelagið

Fíggjarmálaráðið á fmr@fmr.fo
Almannamálaráðið á amr@amr.fo
100 Tórshavn

Dagfesting
18. januar 2018

Okkara j.nr.
18/04172 v.fl.

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j. nr. 18/01091, 18/01069, 18-00414

**Viðmerkingar til ávís lógaruppskot úr bústaðarpakkanum, ið eru send til hoyringar**

Landsstýrið hevur sent 3 lógaruppskot til hoyringar, sum eru partur av sonevnda bústaðarpakkanum.

Bústaðarpakkin inniheldur, eftir landsstýrisins kunning fylgjandi átøk, nevnd bústaðarátøkini:

- 200 bústaðir afturat beinanvegin
- Nýtt mark fyri vinnuligari útleigan
- Fleiri eldraíbúðir byggjast
- Bráðtørvslisti gerast
- Betri vitan og hagtøl um bústaðarstøðuna
- Privat útleigan lagaligari skattað
- Betri møguleikar hjá privatum at byggja leigubústaðir
- Greina lánimøguleikarnar uttan fyri meginøkið

Yvirskipað sæð fegnast Kommunufelagið um, at landsstýrið við hesum lógarbroytingum tekur stig til at loysa uppgávuna og avbjóðingarnar á bústaðarmarknaðinum, ið landið varðar av.

Hinvegin metir Kommunufelagið, at innihaldið í bústaðarpakkanum er ov lítið ambitiøst og als ikki í nóg stóran mun er egnað at loysa trupulleikarnar við bústaðartroti.

Kommunufelagið eftirlýsir eisini, at landsstýrið fyriheldur seg til strukturel viðurskifti og trupulleikar á bústaðarmarknaðinum, ið ikki bert hava til endamáls at loysa ein bráfeingistørv, sum er íkomin í einum hákonjukturi og kanska eisini orsakað av einum hákonjukturi, men eisini setur sær fyri at koma við loysnum, ið eru langtíðartryggjaðar og sum stuðla uppundir at tryggja ein stabilan bústaðarmarkna.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotini í bústaðarpakkanum verður yvirskipað umrøtt um bústaðartrotið og í uppskotinum um víðkaðar lániheimildir til Bústaðir verður skrivað um Bústaðir og bústaðarmarknaðin, og um at bygnaðarliga undirskotið av bústaðareindum er stórt, men burtursæð frá ítøkiligu heimildunum í lógaruppskotinum um Húsalánsgrunnin, er trupult at fáa eyga á uppskot til loysnir, ið fyrihalda seg júst til bygnaðarlig viðurskifti.

Til dømis kann nevnast, at flestu norðurlendsku londini hava skipanir við bústaðarískoyti (boligsikring) og tað undrar Kommunufelagið, at hetta als ikki er partur av kjakinum um bústaðarmarknaðin og møguliga eisini í sjálvum bústaðarpakkanum. Hetta evnið átti at verið

ein sjálvstøðugur táttur í kjakinum, uttan at Kommunufelagið hervið ítøkiliga tekur støðu til eitt tílíkt evni.

Kommunufelagið undrast eisini á, at fleiri viðurskifti, ið møguliga kundi verið egnaði at lætt um og stimbrað áhugan at byggja (leigu-) bústaðir kring landið, als ikki eru umrøddir í pakkanum, t.d. møguleikin at langtíðarleiga lendi at byggja á.

Tey lógaruppskot, ið eru sent til hoyringar eru hesi:

- broyting í leigulógini
- broyting í eldralógini
- broyting í lóg um Húsalánsgrunnin (Bústaðir)

og hevur Kommunufelagið hesar viðmerkingar til ítøkiligum uppskotini:

**Ad 1) broytingar í eldralógini (Almannamálaráðið)**

Høvuðsbroytingin í eldralógini er, at kommunurnar kunnu eftir hesi løgtingslóg eisini seta á stovn eldrabústaðir til borgarar, ið eru 3 ár frá fólkapensjónsaldri.

Í dag er støðan tann, at sambært galdandi eldralóg er heimild at seta á stovn eldraíbúðir til fólkapensjónistar.

Kommunufelagið undrast á, hvussu ein lækking av aldursmarkinum skal viðføra, at kommunur kunnu byggja fleiri eldraíbúðir, soleiðis sum bústaðarpakkin er framlagdur alment. Ógreitt er harnæst, hvussu komið er fram til, at júst 64 ár er rætta markið, heldur enn okkurt annað aldursmark.

Tað sum Kommunufelagið tó hevur størsta fyrivarnið ímóti er, at eldralógin verður nýtt sum eitt bústaðarpolitiskt amboð í sambandi við bústaðarpakkan. Eldralógin er ein tænastulóg, hvørs endamál er at regulera tær tænastur, ið kommunurnar veita á eldraøkinum og er lógin hvørki ætlað ella egnað sum amboð til at regulera bústaðarmarknaðin.

Tær heimildir, sum longu eru í dag í eldralógini til at útvega eldraíbúðir, eru bólkaðar undir bútilboð, og longu í verandi lóggávu eru fleiri ivamál um, hvussu ásetingin skal umsitast í praksis, t.d., um tillutan forútsetur ein tørv á eldratænastum, um tillutan av leigumáli krevur eina visitatión, hvat leigukostnaðurin fyri íbúðirnar eigur at vera o.s.fr.. Hesi ivamál blíva ikki færri ella smærri av ætlaðu broytingini.

Harnæst metir Kommunufelagið, at ætlaðu broytingarnar koma at skapa nýggj markamót í mun til forsorgarlógina og eisini ætlaðu nýggju vælferðarlógina. Hesi markamót eru í dag avgreidd ella rímiliga avmarkaði eftir avgerðunum hjá Markamótsnevndini.

Sum áður fráboðað metir Kommunufelagið, at broytingar í eldralógini eiga at verða gjørdar sum ein avleiðing av eftirmetingini á eldraøkinum, og tí fastheldur Kommunufelagið, at ongar broytingar skulu gerast í eldralógini, fyrr enn komið er á mál við samlaðu samskipaðu eftirmetingini.

Samanumtikið mælir Kommunufelagið tí frá at gera ætlaðu broytingarnar í eldralógini. Í staðin verður mælt til at nágreina verðandi ásetingar um, hvussu hugtakið eldraíbúðir skal umsitast í praksis og annars at halda áfram við at gera eina samskipaða eftirmeting av eldraøkinum. Kommunufelagið er sinnað at koma á fund at umrøða hesi viðurskifti nærri.

**Ad 2) broytingar í leigulógini (Almannamálaráðið)**

Kommunufelagið hevur einki at viðmerkja til ætlaðu broytingarnar í leigulógini.

**Ad 3) broytingar í lóg um Húsalánsgrunnin (Fíggjarmálaráðið)**

Kommunufelagið hevur einki at viðmerkja til ætlaðu broytingarnar í lógini um Húsalánsgrunnin.

Í aðra mátar hevur Kommunufelagið ikki fleiri viðmerkingar til uppskotini.

--oOo--

Kommunufelagið tilskilar sær tó rættin seinni at koma við fleiri viðmerkingum til samlaða bústaðarpakkan og avbjóðingunum á bústaðarmarknaðinum í síni heild.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo